# kkurt serstakt i vilja yvirhálast

fingið ein tunnil, og hann setir nøkur krøv. Millum annað samstarv, og Íverksetarahúsið er fyri allar føroyingar, slær Jens Ravn fast.

### Herning og Føroyar í somu støðu

Í farnu viku hevði Sosialurin prát við íverksetaran Søren Ejlersen, sum eisini vitjaði í Føroyum í sambandi við nýggja Íverksetarahúsið í Klaksvík. Tá staðfesti hann týdningin av at flyta seg millum tey fremstu.

– Vit mugu skilja týdningin av at flyta seg í fremstu røð. Heimurin er vorðin eitt nógv minni handilsøki, og tí er tað avgerandi neyðugt, at pláss er fyri innovatión og menning, segði Søren Ejlersen millum annað tá.

Hesum er Jens Ravn fullkomiliga samdur í.

– Í Herning vóru vit samd um, at vit máttu gera okkurt serstakt fyri ikki at verða yvirhálað av stórbýunum. Í Føroyum er støðan júst tann sama. Føroyar mugu til at gera okkurt serstakt nú, um tit ikki ynskja at verða yvirhálaði, sigur Jens Ravn.

### Mennið ein føroyskan stoltleika

Men hetta serstaka kann bert fremjast í verki, um føroyingar samstarva um hetta, heldur Jens Ravn.

– Klaksvík, Tórshavn og allar Føroyar mugu samstarva. Tit hava hvørki tíð ella ráð til annað, sigur Jens Ravn. Hann heldur, at tað føroyingar fyrst og fremst áttu at samstarva um, er at finna eitt brand fyri Føroyar.

– "Made in Føroyar" eigur at vera eitt góðskumerki. Tit eiga at menna ein stoltleika um, at her natúrligt og reint allastaðni, vísir hann á, meðan hann undrast yvir, at føroyingar ikki síggja størri virði í eitt nú ullini.

– Eg havi latið mær fortalt, at tá tit fletta seyð verður ullin brend. Hetta skilji eg ikki, tí tit hava jú møguleika at gera ullina til eina serstaka vøru, heldur Jens Ravn.

Men eitt er at framleiða serstakar vørur. Eitt annað er menna vørur, vit frammanundan hava.

– Víðarimenning av vørum mugu tit eisini leggja tykkum eftir, sigur Jens Ravn.

**"Made in Føroyar" eigur at vera eitt góðskumerki. Tit eiga at menna ein stoltleika um, at her natúrligt og reint allastaðni**



*– Við tí ferðini Rani hevur, er tað bara talan um nakrar fáar dagar áðrenn Íverksetarahúsið er fult í virksemi, sigur Jens Ravn, sum heitir á politikarar og vinnulívsfólk um stuðla húsinum. Á myndini síggja (frá vinstru) Søren Ejlersen, Rana Nolsøe og Jens Ravn uttan fyri Íverksetarahúsið*

*Mynd: Høgni Thomsen*

## Øll mugu standa saman um húsið

**– Við tí ferðini Rani hevur, er tað bara talan um nakrar fáar dagar áðrenn Íverksetarahúsið er fult í virksemi, sigur Jens Ravn, sum heitir á politikarar og vinnulívsfólk um stuðla húsinum**

ÍVERKSETAN

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Jens Ravn er ikki í iva um, hvør fortreytin er fyri, at tað skal vera Íverksetarahúsinum í Klaksvík lív lagað.

– Politiski stuðulin má vera 100 prosent. Eisini mugu tey, sum mynda vinnulívið í dag, taka undir við hesum og stuðla ætlanini. Síðst men ikki minst mugu fjølmiðlarnir halda kókið í grýtuni.

– Tað sigur seg sjálvt, at tess størri ans fjølmiðlarnir geva hesum, tess meiri veksur áhugin. Og tá áhugin veksur, er tað fleiri møguligir íverksetarar gera vart við seg, sigur Jens Ravn.

### Stórur tørvur á húsinum

Tað er eitt ár síðani, at Jens Ravn og Rani Nolsøe fóru undir samstarvið, sum nú sæst aftur í, at Íverksetarahúsið í Klaksvík er latið upp.

Við Sosialin í farnu viku segði íverksetarin Søren Ejlersen seg síggja stórar møguleikar í Íverksetarahúsinum.

– Hetta er ein góð verkætlan. Hetta verður gjørt alla aðrastaðni við. Fyri at gera vart við seg og fyri ikki at verða yvirhálað á globala marknaðinum, segði Søren Ejlersen tá.

Og Jens Ravn sær somuleiðis stórar møguleikar í Íverksetarahúsinum.

– Við tí ferð Rani (Nolsøe, blðm.) hevur, er tað bara nakrar dagar tað snýr seg um, so er fult av virksemi í húsinum, flennir Jens Ravn, men sigur so, at tað er ilt at meta um, júst hvussu langa tíð tað tekur at skapa eitt støðugt virksemi í einum slíkum húsi.

– Hinvegin vil eg gjarna sláa fast, at tørvurin á einum slíkum húsi her er stórur, sigur Jens Ravn.